# Eivør er nakað serligt

**– Talentið og teknikkurin hjá Eivør Pálsdóttir er framúr, sigur dirigenturin hjá Danmarks Radio Big Band, sum væntar sær nógv av útgávuni við føroysku songkvinnuni**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Danmarks Radio Big Band væntar sær nógv av útgávuni, sum kenda danska orkestrið ger saman við Eivør Pálsdóttir.

Samstarvið byrjaði í fjør, tá ið Eivør var í studio saman við DR Big Band. Ætlanin var, at hon skuldi syngja tveir sangir inn, men danska orkestrið var so hugtikið av føroysku songkvinnuni, at upprunliga upptøkurnar vórðu ikki brúktar, tí orkestrið vildi heldur sleppa at gera eina heila fløgu saman við henni.



Í januar mánaði var Eivør í studio saman við DR Big Band, og har var tónleikurin til nýggju fløguna spældur inn.

– Talentið og teknikkurin hjá Eivør Pálsdóttir er framúr. Úrslitið er nakað heilt fyri seg og hevur tikið allar luttakararnar í hesum projektinum við stormi, sigur Nikolaj Bentzon, sum er dirigentur og framleiðari hjá Danmarks Radio Big Band.

### Komandi klassikari

Sangirnir, sum Eivør hevur spælt inn saman við danska orkestrinum, eru sangir hjá Eivør og tulkingar av sangum hjá øðrum. Peter Jensen og Jesper Riis hava lagt tónleikin til rættis fyri big band, men Eivør verður framvegis í miðdeplinum við síni frálíku rødd.

– Eivør hevur ein serstakt listarligt úttrykk, sum kanska byrjar og endar við Føroyum, men sum harímillum avdúkar nógvar aðrar eginleikar og ávirkanir. Tað gevur samanlagt ein solist við sterkum, hugtakandi og upprunaligum eyðkenni, sigur Nikolaj Bentzon.

– Vit kenna á okkum, at vit hava gjørt ein komandi klassikarar, sigur hann um útgávuna, sum kemur út seinni í ár.

### Eisini konsertir

Umframt útgávuna skulu Eivør Pálsdóttir og Danmarks Radio Big Band eisini hava konsertir saman – bæði í Danmark og í øðrum londum.

Konsertirnar verða í tveimum umførum í ár. Í mars mánaði verða konsertir ymsastaðni í Danmark, og í heyst spæla tey í Danmark og øðrum londum.

Fyrsta konsertin verður 18. mars í mentanarhúsnum Gimle í g Føllenslev. Síðani verða konsertir í Næstved, Copenhage Jazzhouse, Hallkær Kro og í Aalborg.

*Dirigenturin hjá Danmarks Radio Big Band, Nikolaj Bentzon, væntar sær nógv av samstarvinum við Eivør Pálsdóttir*

# Starvið helst lýst leyst aftur

**Formaðurin í stýrinum fyri Listasavn Føroya roknar við, at leiðarastarvið á Listasavnið verður lýst leyst av nýggjum. Men so skal stýrið fyrst semjast um orðingina fyri eina lýsing**

LISTASAVN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stýrið fyri Listasavn Føroya kann ikki semjast um, hvør skal setast í starvið sum leiðari fyri savnið, og nú er sannlíkt, at starvið verður lýst leyst av nýggjum.

Tvær innstillingar og meirilutin peika á Helga Fossádal, men formaðurin í stýrinum er ímóti, tí hann heldur, at leiðarin sambært starvslýsingini skal hava listfrøðisliga útbúgving, og tað hevur Helgi Fossádal ikki.

– Fyri mær er tað púra greitt, at leiðarin á Listasavninum skal hava listfrøðisliga útbúgving, sigur Gunnar Hoydal, formaður í stýrinum fyri Listasavn.

Hann heldur, at hetta er so avgerandi fyri starvssetanina, at hann vil ikki boyggja seg, hóast viðtøkurnar fyri Listasavnið siga, at avgerðir í stýrinum verða tiknar við vanligum meiriluta, og tríggir av fýra limum vilja hava Helga Fossádal í starvið.



*Stýrið fyri Listasavn Føroya klárar ikki at seta nýggjan leiðara, tí formaðurin og hinir stýrislimirnir eru ósamd. Nú endar tað helst við, at starvið verður lýst leyst av nýggjum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Nýggj lýsing kann skapa stríð

Tað hevur ikki eydnast stýrinum at gera eina felags niðurstøðu, hóast fýra fundir hava verið um málið, og nú vil meirilutin hava landsstýrismannin við mentamálum at staðfesta avgerðina hjá teimum.

Landsstýrismaðurin hevur áður víst málinum frá sær, tí hann sigur, at tað er stýrið fyri Listasavnið, sum skal seta leiðaran. Verður hetta aftur svarið frá Jógvan á Lakjuni, er tað sannlíkt, at starvið sum leiðari á Listasavni Føroya verður lýst leyst av nýggjum.

– Um landsstýrismaðurin einki vil gera við málið, so mugu vit í stýrinum aftur tosa um málið, og so er mest sannlíkt, at starvið verður lýst leyst av nýggjum, sigur Gunnar Hoydal.

Og spurningurin er so, hvussu tað verður við nýggju starvslýsingini.

– Stýrið skal semjast um eina orðing til starvslýsingina, áðrenn starvið verður lýst leyst av nýggjum, sigur formaðurin í stýrinum.

Júst hendan orðing og týdningurin, sum verður lagdur í, at leiðarin skal hava listfrøðisliga útbúgving, kann gerast næsta stríðsmálið í stýrinum fyri Listasavnið.

## Býráðsfundur útsettur

Fyrsti regluligi býráðsfundurin hjá nývalda býráðnum í Klaksvík skuldi verða týskvøldið, men á middegi varð hann avlýstur. Orsøkin verður søgd at verða, at nøkur praktisk viðurskifti forðaðu fyri, at fundurin kundi haldast.

Býráðsfundurin er útsettur í nakrar dagar, og lýst verður, tá ið hann verður hildin.

## Tosa um nýtslu hjá børnum

Hóskvøldið fer Erika Anna Hayfeld at tosa um børn og teirra brúk. Tað ger hon á Klaksvíkar bókasavni frá klokkan 19.30.

Erika Anna Hayfield er phd-studerandi í tí partinum av marknaðarførslu, ið snýr seg um atburðin hjá brúkarum. Hon fer at tosa um tann týdning, børn hava sum brúkarar.

Sagt verður, at fyrilesturin er á føroyskum og einum støði, sum er vælegnaður til bæði ung og vaksin.

Aftaná fyrilesturin verður høvi at seta spurningar. Eisini verður kaffi og køkur at fáa.